# Stanley í Århus



**Føroyski vísusangarin Stanley Samuelsen støkkir leygarkvøldið 19. mai inn á gólvið hjá føroyingfelagnum í Århus**

TÍÐINDASKRIV

Stanley Samuelsen fer á konsertini at spæla sangir av vælumtóktu fløgunum “Um eg kundi kvøðið” og “Sól og regn” umframt onnur løg burturúr stóru rúgvuni av sangum, ið hann hevur spælt millum ár og dag.

Hetta er fyrstu ferð, at Stanley spælir í Áarstovu. Hann hevur oftani áður vitjað býin í tónleikaørindum, men hetta verður fyrst ferð, at føroyski vísusangurin spælir fyri einari føroyskari áhoyrarafjøld í Smilets by.

Stanley Samuelsen er føddur og uppvaksin í Fuglafirði. Hóast hann hevur búð nógv ár í útlegd, so hoyrast týðulig spor úr Føroyum í hansara tónleiki. Hann syngur á fleiri málum. Á seinastu fløguni var svenskt, føroyskt, enskt og danskt umboðað. Sum vísusangari er Stanley mest kendur fyri tulkingar av føroyskum yrkingum hjá eitt nú Janusi Djurhuus og Kristiani Matras, har hann sjálvur ger løg til.

Stanley hevur verið virkin tónleikari í fleiri enn fjøruti ár. Hansara tónlistarliga yrkisleið byrjaði í bólkinum Silly Boys, sum taldist millum best umtóktu føroysku bólkarnar í sjeytiárunum. Bólkurin spældi fyri seinastu ferð á páskum í ár. Harumframt hevur Stanley verið virkin í smærri bólkum og nógv sum einstaklingur. Hann er væl umtóktur millum danir, og tað varð staðfest í 1992, tá hann fekk tillutað mentanarvirðislønina hjá LO.

Kostnaðurin verður 50 krónur fyri limir í føroyingafelagnum í Århus og 80 krónur fyri ikki limir. Tiltakið byrjar kl. 21.00

Fleiri upplýsingar finnast á www.stanleysamuelsen.dk



## Regnar bert byin.fo

Showmenn syngja seinasta vers, og tí hevur verið neyðugt hjá Rex at finna ein nýggjan bólk at taka yvir. Bólkurin er All That Rain. All That Rain hevur gjørt sáttmála við byin.fo, sum inniber, at bólkurin einans spælir fyri byin.fo í Havn. Hetta vikuskiftið spæla All That Rain til dans í Rex


# Skipaeftirlitsfólk

Skipaeftirlitið søkir eftir einum skipaeftirlitsfólki. Talan er um nýtt starv.

**Starvið er í høvuðsheitum skrivstovuarbeiði/málsviðgerð og inniber m.a. hesar upppgávur:**

- At skipa og kunna seg um altjóða regluverkið
- Samskipandi leiklutin viðvíkjandi arbeiðinum í IMO
- At samstarva tætt við løgfrøðingarnar á Skipaeftirlitinum
- At samskipa innanhýsis kunning á Skipaeftirlitinum um regluverkið
- At luttaka í uppgávum tvørtur um arbeiðsøkini á Skipaeftirlitinum undir hesum verkætlanum

**Førleikakrøv:**

- Til starvið krevst viðkomandi útbúgving sum t.d. skipsførari ella maskinmeistari
- Góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Gott innlit í sjóvinnu og avbjóðingarnar innan eftirlit, sum skip koma út fyri í altjóða høpi

Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur starvsroyndir.
Fyrimunur er, um umsøkjarin hevur royndir at undirvísa og hevur kunnleika til góðskustýring (kvalitetsstýring), ISM og ISPS.

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági. Upplýsast kann, at lønin í løtuni er góðar 30.000,- kr. um mánaðin umframt eftirlønarskipan.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum. Starvið inniber nakað av ferðing bæði innan- og uttanlands.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi **23. mai 2007, kl. 14.30.**

**Umsóknir skulu sendast til:**
Skipaeftirlitið,
Postsmoga 26, 370 Miðvágur

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.

Skipaeftirlitið
Skipaeftirlitið · Postsmoga 26 · 375 Miðvágur
Tel +298 355600 · Faks +298 355601 · fma@fma.fo





# Føroyskt Ísraelskt fagnaðarkvøld

## í Norðurlandahúsinum 13. mai 2007 kl. 19.30

**Skráin fyri fagnaðarløtuna í Norðurlandahúsinum verður fjølbroytt við sangi, tónleiki og gestaheilsanum úr Ísrael**

**Sangur:**
Ebenezerkórið, Heini Lützen, Leigh Hjaltalin,
Ólavur á Váli Olsen (saman við Eli Smith og Britu á Váli Smith),
Sigrid Rasmussen.

**Tónleikur:**
Helga Hilmarsdóttir Gerðalíð, klaver, Monika Stauss Joensen, fíól.

**Gestir úr Ísrael:**
Tríggir gestir úr Ísrael verða við í føroyska-ísraelska fagnaðarkvøldinum. Teir eru: Hannah Erez, ið hevur verið staðkendur leiðari (guide) á mongum av ísraelsferðunum Danny Amir, ið hevur samskipað flestu Ísraelsferðirnar David Walzer, Ísraelski sendiharrin í Danmark.

Felagsskapurin "Keren Hayesod", ið virkar fyri at savna pening til at fáa jødar heimaftur til Ísraels, hevur eina framsýning í móttøkuhøllini í Norðurlandahúsinum sunnudagin seinnapartin. Møguleiki er at keypa sær ein drekkamunn.

**Atgongumerki fáast á hesum støðum:**
Kunningarstovuni í Havn, tlf. 302425
Kunningarstovan í Runavík, tlf. 449449
Kunningarstovuni í Fuglafirði, tlf. 444860
Norðurlandahúsinum, tlf. 351351, teldupostur: nlh@nlh.fo

Yvirskotið fer óskert til kristna blindaheimið “House of Hope” í Betlehem, sum nógvir føroyingar kenna frá vitjanunum í Ísrael.

Kostnaðurin fyri atgongumerki er kr. 100.